## Nazi-heilsan øsir

23 ára gamli framherjin hjá italska Lazio, Mauro Zarate, hevur øst italienarar, tí hann í farnu viku sendi eina nazistiska heilsan, sum Adolf Hitler brúkti undir seinna heimsbardaga, út ímóti fjepparunum hjá felagnum, tá liðið tapti 0-2 fyri Bari. Fjeppararnir hjá Lazio eru tiltiknir fyri at vera høgravendir, og fyrrverandi framherjin, Paolo Di Canio, hevur fingið bøtur fyri at heilsa teimum á ivasaman hátt.



## Áhugaður í Liverpool

News of the World skrivaði í gjár, at portugisiski fótbóltsvenjarin, José Mourinho, er áhugaður í at gerast venjari hjá Liverpool í summar. Men hann vil ikki umhugsa møguleikan nærri, uttan so at eigararnir í felagnum verða skiftir út. Amerikansku eigararnir av Liverpool eru umstríddir, og felagið stríðist við síni fíggjarligu viðurskifti. Var ein loysn funnin á hesum, skal Mourinho verða til reiðar at fara til Liverpool at starvast.

# SÍ vann bæði gullið

**Kvinnurnar í Sørvági, sum hava runnið undan hinum í allan vetur, vunnu báðar FM-finalurnar ímóti TB um vikuskiftið og eru føroyameistarar. Tær hava eisini vunnið steypakappingina, so aftur í ár gjørdist tað til greipuna**



einstitir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Enn eina ferð hava kvinnurnar hjá SÍ havt eitt framúr kappingarár. Eins og í fjør, eydnaðist teimum at vinna greipuna, umfram at hetta var triðja føroyameistaraheitið á rað, sum kom til høldar norðuri á Eiði í gjár.

Og enn ganga sørvingar kykir og bíða, hvussu tað fer at spæla av hjá monnunum, sum mugu ígjøgnum ein dyst aftrat, áðrenn teir vita, um tað verður gull ella silvur. Vinnur SÍ gullið hjá monnunum, er talan um eitt fantastiskt ár hjá felagnum, tí so vinna bæði kvinnur og menn greipuna!

Mótstøðuliðið hjá SÍ-kvinnunum var TB, sum við føstum fetum hevur arbeitt seg upp eftir stigatalvuni og kom í finaluna. Tað er kanska eyka flott, tá havt verður í huga, at TB síðsta kappingarár endaði aftast av øllum.

Sæð yvir báðar dystirnar, so fekk SÍ prógvað, at liðið hevur munin á restini. Hóast TB hevði vunnið tveir teir síðstu landskappingardystirnar ímóti SÍ, so sá tað ikki út til at nerva sørvágskvinnurnar, ið bæði leygardagin og sunnudagin tóktust klárar – um enn onkur løta var eitt sindur skinklandi.



### Tveir ymsir dystir

Fyrra finalan leygardagin byrja nervøst hjá báðum liðum, men TB var tað skjótara at fóta sær og vann fyrsta settið 25-17. Men í øðrum setti vóru nervarnar hjá SÍ burturi, og tað gjørdist ein rímiliga tryggur 25-16 sigur, og SÍ helt fram í triðja setti og vann tað 25-19.

SÍ megnaði at leggja gott trýst á TB, sum ongantíð fekk sínar mest royndu spælarar upp í snúningar, og hóast spælið gjørdist javnari í fjórða settinum, har liðini fylgdust hálva leið, eydnaðist SÍ at vinna tað 25-22 og taka fyrsta stikkið í finalukappingini.

Til samanberingar var talan um ein heilt annan dyst í gjár, tí nú tóktust bæði liðini hava meira at bjóða, men hóast TB veruliga royndi og stríddist fyri síni søk, eydnaðist heldur ikki tá at fáa skakað SÍ so mikið, at tað rakk til sigurs.

SÍ fór langt framum í fyrsta setti, og hóast TB kom væl aftur, vann SÍ settið 25-21. Í øðrum setti var SÍ uppaftur betur koyrandi og spældi helst tað besta, sum liðið hevur gjørt í vetur, og TB fekk í roynd og veru einki gjørt fyri at svara aftur, so SÍ vann tað settið 25-13.

Tá gjørdist ólíka javnari í teimum báðum seinnu settunum, har TB vann tað triðja 27-25, men mátti lúta í tí fjórða, 26-28, so SÍ streyk avstað við bæði sigrinum og gullinum. Serliga órógvandi var tað fyri tvørakvinnur, at ein veruligur ivabóltur taldist millum teir seinastu, men ikki gjørdist nakað við tað.

Bæði SÍ og TB gjørdu góða reklamu fyri kvinnuflogbóltinum á Eiði í gjár, og um liðini megna at halda somu styrki komandi ár, er ikki óhugsandi, at tey aftur hittast í finalunum til ta tíð!

## Bæði vildu vinna

Annika Niclasen í SÍ var ein av fegnu og stórsmílandi spælarunum, ið øll vildu heilsa uppá og ynskja tillukku.

– Hetta var ótrúliga deiligt. Nú bleiv tað eisini ein heilt annar dystur í dag, tí bæði lið kempaðu fyri lívinum og vildu bæði tvey vinna. Tí var tað stuttligari at spæla í dag – fyri ikki at tosa um at vinna, segði hon.

Tá vit tosaðu við hana, var framvegis mansfinalan eftir, so hana máttu SÍ-kvinnurnar sjálvandi síggja, men annars ljóðaði ikki, sum tann stóra feiringin fór at verða beinanvegin:

– Eg veit ikki, hvussu nógv vit gera burturúr nú, men næsta vikuskiftið er SÍ-veitslan, so tá fara vit í øllum førum at gera nakað burturúr, segði Annika Niclasen.

hil

## Annika er munurin

Venjarin hjá SÍ-kvinnunum, Johan Petur á Stongum, var ovurfegin eftir finalusigurin og gullið í ítróttarhøllini á Eiði í gjár.

– Hetta var fantastiskt, og nú eri eg øgiliga glaður. Hetta var ein góð og vælspæld finala, segði hann, meðan tað næstan ikki bara til at gera samrøðu við hann, tí fegnir sørvingar og onnur alla tíðina vildu heilsa uppá og ynskja tillukku.

Men hvat er so munurin á SÍ og rest?

Annika á Stongum, hevarin hjá okkum. Hon kann heva bóltar, har móttøkurnar kanska ikki liggja so væl. Hon tuskar runt á vøllinum eftir teimum og klárar at heva upp til ein álopsspælara, sum kann sláa hann niður í gólvið.

hil